## Fekk bara eina sproytu

Fongsulsmyndugleikarnir í amerikanska statinum Ohio hava avrættað ein fanga við at geva honum eina eitursproytu og ikki tríggjar sproytur við trimum ymiskum eiturevnum, sum hevur verið galdandi siðvenja í teimum statunum, sum framvegis hava deyðarevsing. Fleiri eru ímóti tí nýggja avrættingarháttinum, tí tey vilja vera við, at fangin doyr ikki so skjótt sum við trimum innspræningum, og at hann pínist meiri. Myndugleikarnir í Ohio vísa atfinningunum aftur og vísa á, at amerikanski hægstirættur hevur góðkent tann nýggja avrættingarháttin.



## Løgreglan drepur

Tað er væl kent, at brasilskir løgreglumenn eru skjótir at taka skammbyrsuna fram, og nú vísir ein nýggj uppgerð, at tey seinastu seks árini hevur løgreglan í teimum báðum stórbýunum Sao Paulo og Rio de Janeiro skotið 11.000 fólk og rakt tey so meint, at tey doyðu. Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch sigur, at í fleiri førum var talan um beinleiðis avrættingar. Leiðslan í løgregluni umber seg við, at løgreglan er í stríði við vápnaðar rúsevnabólkar, sum eru púra eirindaleysir, og sum eru útgjørdir við alskyns vápnum.

# Landsverk arbeiðir fram eftir

**Áðrenn nýggjár eigur Landsverk at brúka 22 milliónir til íløgur afturat, men klárar bert at nýta 10. Oyvindur Brimnes, stjóri, sigur, at stovnurin ikki fær arbeitt rationelt, tí planleggingin hjá politikarunum er ov vánalig. Fíggjarmálaráðharrin gevur Innlendismálaráðnum skuldina, men tað heldur Annika Olsen lítið um og lempar skuldina í fíggjarnevndina, sum aftur gevur Landsverki skuldina**



*Allir partar, sum hava við játtanina og arbeiði hjá Landsverki at gera, eru samdir um, at stovnurin ikki arbeiðir nóg skynsamt, men ongin sigur seg hava skuldina av tí. Tó minnir onkur á, at nýggja játtanarskipanin kann bera so í bandi, at Landsverk um tvey ár kann arbeiða meiri skynsamt*

PLANLEGGING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Landsverk pjøssar upp á nógvar vegir í løtuni. Ljóskurvar eru í fleiri støðum og arbeiðsmenn eru at síggja nógva staðni, men tað er ikki so undarligt. Stovnurin skal áðrenn árslok nýta ein lítlan fimting av samlaðu íløgujáttanini fyri árið.

Orsøkin til, at millum annað asfaltarbeiði verður gjørt í desembur er manglandi planlegging, og hetta viðgongur stjórin eisini, men hetta heldur hann ikki vera orsaka av vánaligari planlegging hjá Landsverki.

– Tað er ein trupulleiki, at nógvir pengar verða settir av til verkætlanir, sum ikki eru fyrireikaðar. Vit hava sagt tað ár undan ári, at mann eigur at projektera og fyrireika eina verkætlan árið fyri, at mann skal gera hana, so arbeiðið verður gjørt so rationelt sum gjørligt, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri.

Áðrenn árslok skal Landsverk nýta 10 milliónir til íløgur, og tá megnar stovnurin ikki at nýta 12 milliónir krónur av íløgujáttanini.

Hetta merkir altso, at 12 milliónir krónur, sum vóru játtaðar til íløgur í ár fella burtur.

Upprunaliga fekk Landsverk góðar 83 milliónir krónur til íløgur. Hetta varð seinni skorið til 56 milliónir krónur, og enn eru bert 34 milliónir krónur brúktar.

### Fíggjarmálaráðharrin undrast

Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, bæði undrast og harmast, at ein stovnur undir landinum skal arbeiða so lítið rationelt.

– Eg má bara harmast um, at tað er so lítið skil á, hvussu tað verður budgetterað, men eg fái ikki gjørt so nógv við tað, sigur Jóannes Eidesgaard og vísir til Innlendismálaráðið.

Hann leggur afturat, at tá tað verður so skeivt til rættis lagt, at ein fimtingur av allari játtanini skal nýtast í desembur, so er okkurt galið.

– Tað sær út til, at Innlendismálaráðið og Landsverk ikki hava tak á síni planlegging, sigur fíggjarmálaráðharrin.

Til spurningin, um hann ætlar at gera nakað við hetta mál, sigur Jóannes Eidesgaard, at hann í hvussu so er ikki fær longt fíggjarárið, og at hann heldur má tosa við Innlendismálaráðið um hetta.

### Tingið part av skuldini

Annika Olsen, landsstýriskvinna í Innlendismálum, heldur kritikkin hjá fíggjarmálaráðharranum vera undarligan.

– Vit gera alt okkara arbeiði í tøttum samstarvi við Landsverk, men onkuntíð henda broytingar í tinginum og í fíggjarnevndini, sum hava við sær, at Landsverk fær pening, sum tað ikki fær brúkt, sigur landsstýriskvinna.

Hon leggur afturat, at tað ikki er óvanligt, at Landsverk arbeiðir lítið skynsamt, og hetta kemur mest av, at tingfólk halda, at arbeiðir fara í gongd, so skjótt sum peningur er játtaður. Men tað gera tey bara ikki.

– Tað tekur 8 til 24 mánaðir at fyrireika eitt arbeiði, og tí má ein langtíðar íløguætlan gerast.

– Tað nyttar tað lítið at seta 20 milliónir av í eitt ár til eina verkætlan, sum er púra ófyrireikað, sigur Annika Olsen.

Hon greiðir víðari frá, at ofta henda broytingar í íløgunum í desembur árið fyri, og hóast fíggjarnevndin biðir um ráð frá Innlendismálaráði og Landsverki, so verður ofta arbeitt fram eftir fummum.

– Eg havi gjørt tað eg kann, men tað er bara lítið at gera, tá tað ikki ber til at gera nakrar broytingar í nýtsluni uttan at fara í tingið við tí, metir landsstýriskvinnan.

### Og aftur til Landsverk

Eyðgunn Samuelsen er virkandi forkvinna í fíggjarnevndini hjá løgtinginum. Hon ger ikki mætari enn at siga, at tað er Landsverk sjálvt, sum eisini hevur ein part av skuldini av, at so nógvur peningur skal